# Bygdaráðsfundur

**Bygdaráðsfundur 01.12.2008**

**Mál nr. 147/2008 Fíggjarmál**

Í umsókn dagfest 10. november 2008 søkir Tofta Talvfelag um fíggjarligan stuðul í samband við, at felagið arbeiðir við at keypa gamla NEBO, frá brøðrasamkomuni, til teirra felagshús, sum kemur at betra karmarnar og stimbra áhugan fyri telving í kommununi.
Nes kommuna hevur avsett ein stuðul uppá 12.000,00 kr. til Talvfelagið á fíggjarætlanini fyri 2008, og er hetta sami stuðul, sum hevur verið játtaður Talvfelagnum á hvørjum árið síðani 2004.
Í 2004 skipaði Tofta Talvfelag fyri føroyameistarakappingini, og fingu tá fluttar avsettu 12.000,00 krónurnar, men síðani tá, er ongin stuðul fluttur til Talvfelagið, og tí biður felagið nú um, at stuðulin verður veittur teimum við afturvirkandi kraft.
Verður stuðulin latin við afturvirkandi kraft, so er talan um árini 2005 til 2007, og taka vit ár 2008 við, so er talan um í alt 4 ár, á 12.000,00 og tá verður tann samlaða upphæddin 48.000,00 kr.

Ein meiriluti i bygdaráðnum hevur á einum telefonfundi 10. nov. 2008. samtykt at jatta Talvfelagnum fíggjarligan stuðul uppá 48.000,00 kr.

Fíggjarnevndin mælir til, at flyta Talvfelagnum játtanina fyri 2007 og 2008 i alt kr. 24.000,00 kr. i ár, og restin verður avroknað í 2009.
Peningurin verður tikin av konto 493640 ”Stuðul til ymisk endamál”.

Avgerð: Tilmælið hjá Fíggjarnevndin var einmælt samtykt.

**Mál nr. 148/2008 Fyrisitingarmál**
J. nr

Fundardagarnir og nevndarvikurnar skulu ásetast fyri komandi ár.

Uppskot er gjørt um dagfestingina av Bygdaráðsfundum í 2009, og eru teir hesir mánadagar:

2. februar
2. mars
30. mars
27. april
25. mai
22. juni
7. september
5. oktober
2. november
30. november

<u>Nevndarvikurnar vera:</u>

| | |
|---|---|
| Januar | 19.-23. |
| Februar | 16.-20. |
| Mars | 16.-20. |
| Apríl | 14.-17. |
| Mai | 11.-15. |
| Juni | 08.-12. |
| August | 24.-28. |
| September | 21.-25. |
| Oktober | 19.-23. |
| November | 16.-20. |

Fíggjarnevndin mælir til, at bygdaráðið samtykkir løgdu bygdaráðsfundir og nevndarvikur.

Avgerð: Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 149/2008  Fíggjarmál.</u>**

Við byrjanina av útbýggingini av E.R.E., var eitt yvirlit yvir kostnaðin gjørt og ein gjaldsskipan í byggitíðini hjá hvørji einstakari kommunu.
Men kostnaðurin fyri tey 24 búfólkini, sum víðkanin umfataði, bleiv nógv størri (næstan tann dupulti fyri kommunurnar) og tí er neyðugt at halda fram við verandi gjaldsskipan.
Prísurin í hvørjum búplássið á Ellis- og Røktarheimum er settur til 1mió. kr. harav landið betalir eina ½ mió. T.v.s. at víðkanin av E.R.E var sett til 24 mió. kr. og landi betalti 12 mió. kr. meðan kommunurnar betaltu 12 mió. kr. Men kostnaðurin bleiv ikki 24 mió. kr. men 36 mió. kr. og tað merkir, at kommunurnar ikki skulu gjalda 12 mió. kr. men 24 mió. kr. tí landi betalir konsekvent ½ mió. kr. fyri hvørt búplássið.
Pr. 31.12.2007 var restskuldin hjá kommununi tí 1.280.480,13 kr. og kommunan hevur goldið 544.000,00 kr. so restskuldin pr. 31.12.2008 verður 736.480,13 kr. plus rentir,  men kommunan hevur avsett 544.000,00 kr. av á fíggjarætlanini fyri 2009, og tað merkir, at neyðugt verður at avseta pengar til E.R.E. eisini í 2010, so grundin fyri at hetta verður tikið upp sum eitt mál er, at kommunan samtykkir at rinda meirkostnaðin av útbyggingini av E.R.E. á sama hátt sum sjálva uppruna útbyggingina.

Fíggjarnevndin mælir til, at kommunan betalir meirkostnaðin av útbyggingini eftir sama leisti sum uppruna byggingina, t.v.s. 544.000,00 kr. pr. ár, til skuldin er liðug i 2010 tá talan verður um eina minni upphædd.

Avgerð: Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt, og at kommunan rykkir enn einafer E.R.E. um fund, fyri at fáa eina frágreiðing um meirkostnaðin.

**Mál nr. 150/2008 Mentamál.**
J. nr. 2008-0047-0009

Hin 31.10.2008 kom yvirlýsing frá Agenda 21, um burðardygga menning.

Mentanarnevndin tekur undir við yvirlýsingini, og mælir til, at øll Mentanarnevndin fer á fundin sum verður á Hotel Hafnia 12. desember 2008.
Tilmeldingin skal gerast 5. des. 2008.

Avgerð: Tilmælið hjá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 151/2008 Mentamál**
J.nr. 2008-0023-0043
Nes kommuna er við í Sunda Grindafelag.
Pauli Petersen var grindaformaður í Nes kommunu. Nú má ein nýggjur limur veljast í grindanevndina.
Nes kommuna hevur eina grindanevnd, sum skal telja 3 limir.
Magnus í Hjøllum er virkandi grindaformaður og Páll Højgaard er í grindanevndini..

Mentanarnevndin mælir til, at velja hesar 3 persónar sum limir í grindanevndina:
1. Magnus í Hjøllum, Rókavegur, 656 Saltnes
2. Páll Højgaard, Hjallavegur, 650 Toftir
3. Eyðfinn Johannesen, Lýðarsvegur, 650 Toftir

Avgerð. Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.
Eyðfinn Johannesen var úti meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 152/2008 Mentamál**
J. nr. 2008-0023-0041

Hin 06.11.2008 verður søkt um kr. 4.000,00 í stuðli til luttøku á ESTA strúkilærararáðstevnu í Wien 3-9 apríl 2009.

Mentanarnevndin tekur undir við, at strúkarar úr Føroya Musikkskúla luttaka á ESTA ráðstevnuni í Wien, og mælir bygdaráðnum til at játta teimum ein stuðul uppá 4.000,00 kr.

Fíggjarnevndin mælir til at koyra hesa umsóknina í nývaldu Mentanarnevndina sum tekur við 1. januar 2009.

Avgerð: Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr.   153/2008   Tekniskt mál**
J. nr. 2008-0048-0050
Hin  03.11.2004 viðgjørdi bygdaráðið spurningin um grundstykki, sum verða seld í kommunalari útstykking og samtykti, at tey skulu seljast aftur til kommununa, um hús ikki eru bygd á tey.

Broyting er síðan hend viðv. keyp av grundstykkjum burtur av landsjørð. Um borgari nú skal keypa grundstykki, skal keypið fara fram gjøgnum kommununa. Tí er neyðugt at taka støðu til, um samtyktin, sum er gjørd 03.11.2004 skal galda fyri hesi grundstykki.
Tekniska nevnd hevur staðfest, at kommunan ikki er noydd at keypa seld stykkir aftur .

Tekniska nevnd mælir til, at kommunan gevur loyvi til verandi eigarar at selja stykki til keypara sum ynskir at keypa stykkið, treyta av góðkenning frá kommununi, hetta fyri at tryggja, at ongin spekulatión kemur í keyp og søla. av grundstykkjum í kommununi.

Fíggjarnevndin mælir til, at kommunan, saman við sakførara, orðar eitt skriv sum skal tryggja, at kommunan, um - og tá  tørvur aftur verður á grundstykkjum, kann innheinta óbygd grundstykkir til at selja áhugaðum sum hava ítøkuligar ætlanir at byggja.
Borgarar sum nú fáa boð frá kommununi, um at teir kunnu selja stykki samb. tilráðing frá Tekn. nevnd, skulu verða kunnaðir um hesa bygdaráðsins samtykt.

Avgerð: Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 154/2008 Byggimál**
J. nr. 2008-0042-0226
Sp/f hjá Pidda søkir um byggloyvi til skúr vestanfyri handilin.
Hetta verður gjørt fyri at umleggja køliskipanina frá vatn til luftkøling.
Ætlanin er at gera skúrin í sama stíli sum verandi bygningur, við tekju úr pappi, og við so lítlum halli sum gjørligt.

Tekniska nevnd mælir til at játta Hjá Pidda byggiloyvið til at byggja ein tilbygning vestur úr verandi handilsbygningi treytað av, at takrenna ikki kemur út á gongubreytina, og annars eftir galdandi byggireglugerð.

Avgerð: Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 155/2008  Havnamál.**

Kommunan hevur fylt út havnaøkið inni á Rætt, og í seinastuni lagt stórt dekkgrót á økið, og nú er tíðin komin, at leggja hetta dekkgrótið út, fyri at verja og halda uppá útfyllingina.
Kommunan skal tí taka støðu til, um biðast skal um tilboð at leggja hetta dekkgrótið út.

Tekniska nevnd mælir til, at hetta arbeiðið verður boðið út millum AP-bilar, Vestcon,  RTS,  Falkon og EJ Maskinur

Avgerð: Tilmælið frá Teknisku nevnd samtykt.

**Mál nr. 156/2008   Byggimál.**

Kommunan hevur samtykt eina tillagaða reglugerð, ið ásetur treytirnar í byggiloyvinum til uppsetan av vindmyllum.
Ein av treytunum er, at tað skal vera 10 metur til mark, men hetta letur seg ikki gera í flestu førum, tí sjálvt um fráleikin uppá 10 metur kann haldast til síðurnar, so er so gott sum ongarstaðir, at hann kann haldast oman og niðan uttan so, at vindmyllan verður sett á húsatakið.
Treytin uppá 10 metur frá markið, er ásett í reglugerðini hjá bæði Kommunusamskipan Føroya og hjá Føroya Kommunufelag.
Tað er tí neyðugt, at Tekniska nevnd viðgerð reglugerðina fyri Nes kommunu, um henda skal broytast.

Tekniska nevnd mælir til, at Tekniska deild viðgerð hesa áseting um 10 metur frá markið og aðrar, saman við t.d. Føroya Kommunu felag, fyri at finna eina loysn, tí við hesi áseting, kann ikki loyvi gevast til nakra vindmyllu á "vanligum" grundstykkjum.

Avgerð: Tilmælið frá Teknisku nevnd samtykt.

**Mál nr. 157/2008   Vegamál**
*(Mál nr. 135/2008  Vegamál.)*

Á seinasta fundi kunnaði Tekniska deild, Teknisku nevnd um arbeiðið vestan- og sunnanfyri NEBO, sum er um at vera liðugt.

Tekniska nevnd vísti á, at samtykt er at asfaltera økið niðanfyri og sunnanfyri NEBO, og eftir at broytingarnar við innkoyringina og flytan av ljóssteyrum eru gjørdar, verður  økið sunnan fyri NEBO, brúkt sum eitt alment øki til bussar og bilar, sum  skrivlig avtala verður gjørd um, millum Nebo og kommununa, og at hesin servituttur verður tinglisin á matriklinum hjá NEBO.

Avtala er millum Nebo og Tekn. deild hjá Nes kommunu, at tað verður Nebo sum innheintar tilboð uppá asfalteringsarb.
Tekniska nevnd mælir til, at bygdaráðið tekur undir við hesum.
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Nú hevur NEBO v/Haldur Vang boðað frá, at teir ikki ynskja at nakar servituttur verður lýstur á matrikkul nummari hjá NEBO, men teir hava onki ímóti, at teir og kommunan gera eina skrivliga avtalu um nýtsluna av økinum við NEBO, og so verður kommununar partur av asfalteringini samsvarandi hesi avtalu.

Tekniska nevnd mælir bygdaráðnum til, at strika ásetingina um at lýsa ein servitutt á grundøkið, og heldur gera ein skrivliga avtalu um nýtslu av økinum hjá NEBO.

Avgerð: Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 158/2008 Figgjarmál.**

Nú Ólavur Hátún og kór hansara ikki koma at framføra Messias í Kristianskirkjuni í Klaksvík, soleiðis sum ætlanin var, ynskir hann, at kórið hevur framførsluna í Fríðrikskirkjuni, og søkir um stuðul til framførsðluna frá kommununi.
Solistar, tónleikarar og annað í samband við framførðsluna er eitt projekt uppá 180.000,00 kr.

Mentanarnevndin mælir til at jatta kórinum hja Ólavur Hátún 5.000,00 kr. til framførðslu av Messias i Friðrikskirkjuni.

Figgjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini og at pengaranir vera tiknir av "stuðul til ymisk tiltøk".

Avgerð: Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 159/2008 Fíggjarmál.**

Fíggjarætlanin fyri 2009 er samtykt við 2 viðgerð og hevur bygdaráðið sostatt avgreitt fíggjarætlanina fyri 2009 hvat viðvíkur rakstur og íløgur, eftir tí gomlu uppsetingini av fíggjarætlanini.
Men sum øllum kunnugt, er krav nú komið, at uppsetingin av fíggjarætlanini fyri 2009 skal vera samsvarandi teimum krøvum sum landsskipanin ásetur, og tað er nú gjørt, soleiðis at tey somu tølini er uppsett, soleiðis at tey eru samsvarandi fíggjarætlan landsins.
Bygdaráðið skal tí viðgera og samtykkja fíggjarætlanina fyri 2009 soleiðis sum hon nú er uppsett, samsvarandi ásetingum landsins, treytað av at øll tølini eru komin við (stundir hava ikki verið til at tjekka hetta í dag, men

tølini á tí samtykti fíggjarætlanini 2009, ið er uppsett eftir tí gomlu skipanini, eru tey galdandi).

Avgerð: Bygdaráðið samtykti einmælt, at kommunan verður við í hesi ásettu skipan og góðkennir fíggjarætlanina fyri 2009, soleiðis sum hon er uppsett.